

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 07 - 2012

# Kreppan trýstir oljuprísin niður

Oljuprísurin fellur framvegis. Í morgun fall prísurin á einari tunnu av WTT-olju 0,3 prosent til 85,58 dollarar. Brent-oljan fall somuleiðis 0,3 prosent til 99,96 dollarar. Orsøkin er sambært greinarunum kreppan í fleiri evropeiskum londum, sum ger, at eftirspurningurin minkar nógv. Í nógvum londum eru fleiri verksmiðjur stongdar, aðrar hava skert ella repað seglini, og tað saman við einari stórari óvissu í vinnulívinum sum heild ger, at eftirspurningurin eftir olju minkar, og tað trýstir oljuprísin niður. -Prísurin fer ikki at hækka aftur uttan so, at gongd kemur á tveir av trimum teimum størstu búskapareindunum, Evropa, USA ella Kina, sigur Michael McCarthy, sum er marknaðargreinari hjá á CMC Markets í Sydney, við Bloomberg News. OPEC-londini vænta hinvegin, ar eftirspurningurin fer at veksa. Í teirri seinastu mánaðarfrágreiðingini sigur felagsskapurin, at nýtslan verður 900.000 tunnur ella umleið eitt prosent størri um dagin í 2012, men at størri framleiðsla í londum uttan fyri felagsskapin fer at nøkta tann vøksturin.